## Søtur sigur til Christian Høgna

AB við Christian Høgna Jacobsen millum teir fyrstu ellivu vann í gjárkvøldið søtan sigur. Á heimavøllinum í Gladsaxe Idrætspark hevði AB vitjan av toppliðnum í 1. deild Viborg. Úrslitið var 2-1 til heimaliðið, sum við sigrinum - í hvussu so er inntil í dag - er á fjórða plássi við 22 stigum fyri 11 dystir. Viborg er fremst við 25 stigum fyri 11 dystir.



## Krohn-Dehli stóri spælarin

Brøndby er aftur við í toppinum í donskum fótbólti, og um vikuskiftið vann Brøndby oddadystin ímóti FC Midtjylland. Stóri spælarin á vøllinum var Michael Krohn-Deli, sum fyri kortum kom heim úr Hollandi at spæla fyri Brøndby. – Tað er hugaligt at síggja ein spælara við so góðum bóltførleika, sum eisini kann gera nakað serligt. Hann hevði avgjørt ávirkan á úrslitið í hesum dystinum, segði venjarin hjá FC Midtjyllandi, Thomas Thomasberg, eftir tapið.

# Fótbóltsárið í myndum



*HB vann trivaligar sigrar móti fleiri av niðaru støddu liðunum. Góða málúrtøkan bar við sær, at HB fram til næst seinasta umfarið var seinasta hóttanin móti EB/Streymi*



*ÍF skelkaði Víking, tá gestirnir fóru avstað við øllum í Sarpugerði í øðrum umfari. Seinni fingu víkingarnir tó hevndi. Millum annað við 3-1 sigrinum í Fuglafirði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Móti ovaru støddu liðunum stóð KÍ seg sera væl. Eitt nú vunnu teir tvær ferðir móti B36*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Gudmund Nielsen og Arnbjørn Danielsen vóru týðandi spælarar fyri ávikavist B71 og B68. Gudmund verður komandi ár at síggja hjá meistarunum úr EB/Streymi, og Arnbjørn Danielsen sigst ivast, um hann tekur eitt ár afturat í fremstu røð*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Talan var um ordiligt botnbrak, tá KÍ tók ímóti B71 í fjórðseinasta umfarinum. KÍ vann dystin, og so kundu mongu áskoðararnir draga andan nakað nógv léttari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*